# óttarbrøgd



*Her er endiliga ein føroyskur íðkari, sum torir at vísa at næst best er ikki nóg gott, sigur Heri millum annað um grundgevingina fyri, at Heidi Andreasen í hansara hugaheimi stendur ovast, tá metast skal um ársins ítróttaravrik*

har føroysku liðini sleppa at luttaka, tó uttan fyri DM-kappingina. Í 2004 var tað Havnar Fimleikafelag sum umboðði Føroyar, og har gjørdi gentuliði ikki mætari enn at vinna hesa kapping framman fyri øll tey donsku liðini. Og her skal havast í huga, at hóast Danmark kanska ikki er av sterkastu londum í rytminskum fimleiki í løtuni, so hava teir stórar traditiónir innan hendan ítrótt og støði í heimligu kappingini í Danmark er óiva á einum sovorðnum støði, at hetta bragdið hjá havnargentunum gerð at tær hava uppiborið eitt sætta pláss á hesum lista.

## 5. Rúni Seloy

Tað er vorðin fastur táttur at Frælsur Ítóttur Føroya sendur ungar evnaríkar íðkarar til altjóða kappingina Øresuns spelen í Helsingborg. Í 2004 vóru 1500 luttakarar úr 9 ymiskum londum við. Í 2004 var ein av føroysku luttakarnum 10 ára gamli Rúni Seloy. Hann luttók millum annað á 600 m teininum har hann megnaði at gerðast nummar tvey í einari sera harðari kapping við ein javnaldra úr Týsklandi í er kent fyri sína styrki innan frælsa ítróttin. Tíðin sum Rúni nýtti um at renna teir 600 m (1 min 51 sekund) var 32 sekund betur enn gamla bólkametið her heima. Samstundis var tað 5 sekund betur at gamla metið í Øresunds Spelen, og er Rúni sostatt tann sum hevur runnið næst skjótast á hesum teini í hesari kapping nakrantíð. Tað, sum gjørdi úrslitið hjá Rúna til nakað heilt serligt, er, at hann kappaðist á einum undirlagi, sum hann ikki er vanur við at venja á, og á einum støðið sum hann ongantíð hevur roynt fyrr, og hetta gjørdi hann móti javnaldrum sum allir eru vanir við slíkar umstøður.

Nakað sum gevur meir at hugsa um er at Rúni ikki er langt fremstur í Føroyum innan sín aldursbólk, og vísir hetta hvussu stórt potentiali er í Føroyska undgóminum.

## 4. Rúnið Weihe

Tað sum ofta verður sett í samband við Føroyskan flogbólt í altjóða høpi er oyggjaleikir, men seinnu árini eru føroyingar byrjaðir at spæla seg inna á lið uttanlanda. Ein av hesum er Rúni Weihe sum fór til Noregs í lestrarørindum. Har fór hann so at venja við einum felag og kom inn á liðið alt fyri eitt. Hareftir gekk einans framá og endaði hann við at vinna bæði norska meistaraheitið og norsku steypakappingina við liði sínum. Tað, at ein føroyingur spæla seg inn á eitt meistaralið í einum so stórum landið, er eitt satt bragd, sum ger, at Rúni hevur uppiborið fjórðaplássið á listanum.

Liðið hjá Rúna er sligið út úr norsku steypakappingini í vetur, men vónandi megna teir enn eina ferð at vinna meistaraheitið, men ivist ikki í at Rúni hevur sum mál at koma eitt stig longur upp á pallin á oyggjaleikunum á Hetlandi, og tí ynski eg honum góða eydnu við.

## 3. Tódi Jonsson

Tódi Jonsson hevur í mong ár verði roknaður sum ein tann besti um ikki tann besti føroyski fótbólts spælarin. Hann hevur vunnið danska meistaraheitið fleiri ferðir við FCK. Í 2004 vann hann aftur danska meistaraheitið við felagnum, og harafturat var hann við til at vinna donsku steypakappingina. Tað sum tó ger, at Tódi í mínum eygum eigur eitt trygt triðja pláss á listanum, er, at hann so vítt eg minnist megnaði enn eina ferð at gerast tann á FCK liðinum sum skoraði flest mál í landskappingini, sostatt eigur hann sín stóra lut í gulliðnum og steypinum hjá felagnum. Haraftrat er Todi tann aktivi spælarin í FCK sum hevur skorað flest mál fyri felagið yvirhøvur.

Tað hevur ikki gingið heilt eftir vild hjá FCK eftir at kappingin byrjaði eftir summarferiuna í ár, og kanska er partur av orsøkini tann, at Todi hevur verði nakað skaddur, og tí ikki hevur kunna skora tey málini sum liðið manglar í løtuni.

## 2. Kvinnulands liði í hondbóltið

Hondbóltskvinnurnar hava í nógv ár ikki fingið møguleikan fyri at royna seg í altjóða kappingum. Hetta broyttist í 2004 og tað var ein broyting sum kom at merkjast. Kvinnurnar luttóku í einari challenge trophee kapping í Italien. Vónirnar vóru ikki stórar undan kappingini, hetta kom eina mest av at ongin visti hvat hesar í altjóða høpi óroyndi kvinnurnar megnaðu. Kvinnurnar vunnu á so stórun londum sum Belgia, Ísrael og Finlandi á teirra veg til finaluna har tær at enda noyddust at lúta fyri Italia. Bragdið í Italia gjørdist enn meira spennandi at fylgja av "ársins frásøgumanni!" Hilmar Jan Hansen sum, eins og onkur tók til, man verða ein av mest partísku frásøgumonnunum í søguni, og tað eru vit mong sum eru glað fyri at hann var!

Tað er sera torført hjá einum so lítlum landi sum Føroyum at gerða seg galdandi innan liðítrótt tí at tað krevst at at vit hava nógv fólk av sera høgum klassa á toppinum samstundis, meðan tað innan einstaklinga ítrótt einans krevst ein fyri at koma líka langt. Tí er avrikið hjá kvinnunum so mikið stórt at tað hevur fortjent eitt trygt annað pláss á listanum. Og eg vóni at tað fíggjarliga hjá hondbóltsambandinum lagar tað so at vit sleppa at síggja hesar kvinnur aftur á altjóða pallinum har tær hava víst at teir hoyra heima.

## 1. Heidi Andreasen

Eitt ítróttarfólk skaraði tó fram um øll onnur í farna árið. Tað var Heidi Andreasen sum megnaði at vinna gullmerki og seta heimsmet í altjóða kappingum, og eisini at vinna eitt bronsumerkið í 400 m frísvimjing á olympisku leikunum. Øll hesi eri úrslit sum eru av einum slíkum klassa at onnur føroysk ítróttarfólk einans kunna síggja upp til hesa ungu kvinnu, sum hevur megna at etablera seg sum ein av heimsins bestu ítróttarfólkum innan sína ítrótt. Eg havi valt at seta Heidi á fyrsta plássi, tí at honn vann bronsumerkið til OL orsøkin til at eg velji hetta úrslit framum t.d. eitt heimsmet er, at hon hevði hug at umbera at hon ikki megnaði at vinna føroyingum okkurt gullmerkið. Her er endiliga ein føroyskur íðkari, sum torir at vísa at næst best er ikki nóg gott. Og hví skal tað verða tað, tá man hevur víst, at man kann megnað at verða best? Hví skulu vit ganga runt og verða glað fyri at tapa tá vit kunna vinna?




*Kanska er partur av orsøkini til tungu gongdina hjá FCK í løtuni tann, at Todi hevur verið nakað skaddur, og tí ikki hevur kunna skora tey málini sum liðið manglar í løtuni*